## HEILSANIR



**Góði Andrias**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum 21. apríl. Alt tað besta ynskja vit tær.
**Mamma, babba, Karl Marius og Rakul**



**Góði Gunnar**
Hjartaliga tillukku á tí runda degnum 22. apríl
**Ynskja starvsfelagarnar í Kistuvík**


### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ......................................................................
Bústaður: ......................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**


## VIÐMERKINGAR

# Ørvitistos

**Marjus Dam, løgtingsmaður**



Sambandsflokkurin hevur ikki stóra trongd at skerja ríkisveitingina, men heldur lata hana fara til tey økir hon eigur at fara til, nevniliga til Skúla, Heilsu og Almannaverk. Viðurskiftini innan hesi økir eru alt annað enn nøktandi.

Álvaratos, eiga ikki hesi og mong onnur viðurskiftir at koma í rættlag áðrenn milliardaupphæddir av ideologiskum ávum verða blakaðar burtur?

Tað eru betri møguleikar fyri at byggja og menna land innan ríkisfelagsskapin enn uttanfyri. Ríkisfelagsskapurin ikki bert gevur okkum nógvar og stórar møguleikar sum ríkisborgarar, men eisini størri fíggjarligan førleika, enn vit annars vildu havt. Tað er ørvitisskapur at pástanda, at ongin munur er.

Dánjal Jákup Hansen skal hava takk fyri viðmerkingarnar til grein mína um samferðsluna. Tað er altíð gott at hoyra hugsanir hjá øðrum, tá um samfelagsviðurskiftir ræður.

Eg skal vera tann fyrsti at geva honum rætt í, at tað sjálvandi er neyðugt at reka ein skilagóðan búskaparpolitikk. Um vit ikki gera tað er vandi á ferð. Á hesum øki er Sambandsflokkurin í tráð við hugsan D.J. Hansen. Bert undrar tað, at sami D.J. Hansen ikki stillar kritiskar spurningar til veruliga ørvitispolitikkin í Føroyum ídag, nevniliga loysingarpolitikkin og serliga fíggjarligu av-leiðingarnar hesin kemur at hava fyri vanliga føroyingin. Hendur onki negativt fyri borgaran, um helvtin av fíggjaræltanini verður burtur?

Tað kann passandi H.J. Hansen spyrja sínar egnu um, tí vit hava spurt, men ongantíð fingið svar. Føroyingar hava spurt, men ongin hevur fingið svar. Alt skal dyljast til aftaná, sær tað út til.

Fyri at reka ein skilagóðan búskaparpolitikk, so er neyðugt at reka ein skilagóðan politikk. Ein politikk, ið ger, at samfelagsbúskapurin gerst so sterkur sum møguligt eins og gevur landi, vinnu og fólki optimalar umstøður. Tá hetta mál er nátt, kann ein gera skilagóðar íløgur og útbyggingar.

Og júst vánaligi politikkurin, ið verður sagdur at vera stevnumiði hjá loysingarsamgonguni í løtuni er vandamikil. Han skerjir nevniliga okkara fíggjarliga førleika fullkomuliga. Um tað brestur fyri nevni í seinasta neyðareggi samgongunn-ar, skulu eftir 6-7 mánaðum yvirtakast sera nógv og stór málsøkir. Samstundis skal ríkisveitingin skerjast »300-400 milliónir minst« (sum skrivað stendur í samgongusemjuni). Komandi árini skulu so einar hálvthundrað milliónir minkast afturat hvørt árið. Um ætlanin verður fylgd komandi 4 árini verður ein minking uppá 400 + 450 +500 +550 milliónir krónur ella umleið 2 milliardir í reiðum, ikki prístalsreguleraðum krónum. Um øll ætlanin verður fylgd, missir føroyska samfelagið einar 10-20 milliardir krónur. Umframt rættindir, vit í dag hava í Ríkisfelagsskapinum. Rættindir, ið vit helst skulu koma at gjalda fyri í framtíðini. Harafturat hava vit eina sera stóra uttanlandaskuld. Hví dylja hendan veruleika fyri føroyingum?

At yvirtøkurnar harumframt koma at krevja størri umsiting og harvið eisini øktan almennan íløgu og rakstrarkostna er sannlíkt.

Tí er lítil ivi í, at føroyska samfelagið komandi 4 árini, ið hesum dømi fær eina størri rokning enn tær 2 milliardirnar í ríkisveitingin minkar.

At hendan rokning frá loysingarsamgonguni ger, at framtíðarútbyggingin og menningin av samfelagnum verður ávirkað og helst steðgar heilt upp, man somuleiðis lítil ivi vera um. Ríkisfelgasskapurin – ikki so galin!

At hetta als ikki er galdandi í Føroyum ídag, vísa øll tøl púra greitt. Og vit eru í Ríkisfelagsskapinum, ið loysingarfólk royna at sverta út! Føroyar ídag eru prógv um, at Ríkisfelagsskapurin virkar, um væl verður stýrt. Føroyar eru eisini eitt prógv um, at onki virkar, um illa verður stýrt. Tá hugt verður eftir gongdini ídag, so skilir ein illa, hví loysingarflokkarnir ikki avtaka seg sjálvar. Tað hevði verið besta og størsta gagni teir kundu gjørt Føroyum.

Eftir míni bestu sannføring koma ríkisfelagsskapsflokkarnir at hava betri møguleika at byggja og menna føroyska samfelagið enn loysingarflokkarnir. Tí vit hava meira pening, fleiri krónur. So einkult er tað.

Loysingarfólk kunnu ikki tosa um útbygging:

Tá ið loysingarflokkarnir tosa um Suðuroyarskip, Leirvikstunnil, sjúkrahús útbygging og skúladeplar fyri milliardir- tá er talan um stemmufiskarí, so tað stendur eftir. Teir kunnu loysa og skerja. Tað er sera einkult.

Tá ið Sambandsflokkurin tosar um menning og útbygging, so er talan um ein skilagóðan politikk innan ríkisfelagsskapin. Um vit í Sambandsflokkinum vildu loyst, so høvdu vit eisini havt rygg til at havt boðskapin ið kravdist til føroyingar, nevniliga, at neyðugt var at skerja og spara, spara og skerja. At neyðugt var við fólkafráflyting, arbeiðsloysi, fallittum og tvingsilssølum. Tað er nevniliga fylgjan av at loysa. Tað er so einkult, so einkult.

Tað er ein stórur munur:

Tað er nevniliga ein stórur munur á loysing og sambandi – har sambandið vinnur á loysingini á øllum økjum, ikki minst í veljarakanningum. Og vit skuldu eisini greitt vunnið eina fólkaatkvøðu um hendan spurning 26. mei – um loysingarsamgongan tordi at lata fólki tala.

Eftir Sambandsfloksins hugsan, so eiga, skulu og mugu vit at gera broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum innan karmarnar av ríkisfelagsskapinum. Tað hava vit greitt meldað út.

Nógv er at gera og alt kostar:

Er tað ikki soleiðis, at pensiónirnar enn eru mundandi lægri enn í t.d. Danmark. Er ikki okkara sjúkrahúsverk niðurslitið orsaka av m.a. tørvandi viðlíkahaldi? Eigur okkara skúli ikki at fáa tiltrongar ábøtur og betri karmar? Hvat við ellis og røktarheimum, sambýlum, íbúðum til avlamin og breka, tilboðum til ung og eldri kring landi? Hvat við SAMFERÐSLUNI? Hvat við økis og útjaðaraøkismenning?. Vit hava tørv á peningi at byggja okkara samfelag út. Vit hava tørv á einum góðum og sterkum ríkisfelagsskapi, ið higartil hevur verið Føroyum góður. Vit hava ein góðan vin. Ein Ríkisfelagsskapsvin. Latið okkum gera hetta vinarlag betri. Tað er ørvitistos og ørvitisgerð at skaða hetta góða vinarlag.

Latið okkum byggja og gera Føroyar til ein gimstein í Norðuratlantshavið!

# Ungdómurin er framtíðin

**Hetta metir íslendski sjónleikarin og tónleikarin, Egil Ólafsson, ið vitjaði Prix Føroyar finaluna í ár. M.a. var hann ráðgevi hjá bólkunum viðvíkjandi tí at standa á palli**

PRIX FØROYAR
*Dagfinn Olsen*

Ein av gestunum til Prix Føroyar hesaferð, var íslendski tón- og sjónleikarin, Egil Ólafsson. Hann kennir væl Føroyar og føroyskan tónleik og hevur áður verið við á Jazz- Fólka- og Bluesfestivalinum.

Hesaferð var ein av uppgávum hansara at halda fyrilestur um tað at standa á palli og so var hann eisini ráðgevi hjá bólkunum viðvíkjandi hesum sama.

– Tað er ikki so einfalt at standa á palli. Ein skal m.a. ansa eftir vanum, ella óvanum. T.d. er heldur løgið, um sangarin í einum bólki stendur hendur í favn! Ein má hvíla í onkrum og vera í tónleikinum, sigur Egil, tá vit hitta hann til eitt stutt prátt á kamari hansara aftan fyri pallin í prixmerkta Norðurlandahúsinum.

Egil Ólafsson kennir føroyskan tónleik og tónleikarar. Men hvat hevur hann fingið burturúr ferðini hesaferð?

– Her eru mong talent og mong eru ung. Tí er eisini alneyðugt við tiltøkum sum hesum, metir Egil.

– Neyðugt er at tosa um kvalitet. Í Íslandi eru vit von at práta um kvantitet, tú veist, vit hava fiskað, smílist Egil, ið samstundis setir torføra spurningin, um hvussu ein fær kvalitet.

– Hetta er eitt flott og professionelt tiltak, ið er á høgum støði. Ungdómurin er framtíðin og neyðugt er at taka sær av honum, neyðugt er at byggja upp, sigur Egil Ólafsson, ið fegnast um, at nærum allir bólkarnir komu til hansara at leita sær ráð viðvíkjandi pallframførsluni.



## TILTØK

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Heimasíða okkara: www.koma.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Týskvøldið kl. 20 bíbliutími, Ámos kap. 7.
Mikukvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti við Andrass Arge.
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Thomas Thomassen og Teimum 4, barnaansing verður.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20 uppbyggingarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.

**Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í annaðkvøld kl. 19 ungdómsrally, kl. 21 bøn fyri býnum.
Hóskvøldið kl. 19 Teen Xtreme.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Mikukvøldið kl. 20 møti.

**Filadelfia, Sundalagið**
Í morgin kl. 17.30-19.30 Miðdepilin – títt kvøld – tónleikur, spøl, ítriv og matgerð.
Hósdagin kl. 16-17.30 Urtagarðurin – eitt trivnaðarstað fyri børn, kl. 18-19 bønarmøti.

**Siloa, Fuglafjørður**
Mikukvøldið kl. 19.30 bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera, Klæmint Eliasen talar. Evni: Í lívd hins Hægsta.

**Soli Deo Gloria**
Mánadag kl. 20 bønarmøti.
Hósdag kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 16.30 Alphaskeið, kl. 18 møti við Andrias Nýggjagarð.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður í Húsmøðrafelagnum í Bøgøtu 3, fríggjakvøldið 27. kl. 20.00. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Sandoy**
Um vikuskiftið verða hesi møti í Sandoynni:
Leygardagin 28. kl. 15 útimøti í Húsavík og kl. 16 í Skálavíl. Kl. 20 møti í Ungmannafelagshúsinum Samljóð í Skopun.
Sunnudagin 29. verður møti í Samljóð kl. 11 og 15. Sangkórið í Siloa, Fuglafirði syngur og Svenning av Lofti o.o. tala. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20 bíbliutími.

**Betel, Vágur**
Mánakvøldið kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbyggingarfundur.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 23. apríl:*
kl. 09.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen.
kl. 10.15-18.00 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresu felagsskapin.
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl
*Týsdagin 24. apríl:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Hugleiðingar um Havnina í 1920'unum. Annar partur Hjørdis Háberg, Marjun Nielsen lesur
*Mikudagin 25. apríl:*
**Stongt**
*Hósdagin 26. apríl:*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 27. apríl:*
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Pensionistafelagið í Havn**
kemur saman hvørt mikukvøld í Losjuni, Tinghúsvegur 18. Øll M/K sum eru fylt 60 ár eru vælkomin at gerast limir.

**Losjan í Havn**
Fríggjadagin hittast tilkomin og eldri til hugna fyri seinastu ferð í vetur. Tilmeldan verður til útferðina.

**Vágs Matmøðrafelag**
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur verður í kvøld kl. 20–21.30.

**Al-anon**
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International**
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn**
uttanlands, tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Javni N. Finsensgøta 32**
Skrivstovan er á Hoydalsveg 40, 3. hædd (ovast)
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl. 10-14
Fríggjadag kl. 13-16
Tlf. 314827 Fax 310557
e-mail: javni@post.olivant.fo

**MBF-skrivstovan**
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373


Fyri fyrstu ferð í Føroyum




Fleirfalda ferðina á internetinum..!

**Við sn@rNET hjá Føroya Tele kanst tú ferðast á internetinum við rúkandi ferð alt samdøgrið.**

sn@rNET PRIVAT

| Downstream | Upstream | Stovningargjald | Mánaðargjald |
|---|---|---|---|
| 256kbps | 64kbps | 3.995,- | 449,- |
| 512kbps | 128kbps | 3.995,- | 649,- |

*Dátamongdir verða avroknað við 1,50 kr. fyri hvørt megabýt fyri útland og 0,50 kr. fyri hvørt megabýt fyri innanlands dáta. Prísirnir eru við MVG.*

sn@rNET VINNULIGT

| Downstream | Upstream | Stovningargjald | Mánaðargjald |
|---|---|---|---|
| 256kbps | 256kbps | 9.996,- | 1.545,- |
| 512kbps | 512kbps | 9.996,- | 1.396,- |
| 1024kbps | 512kbps | 9.996,- | 1.716,- |

*Dáta verða avroknað við 0,80 kr. fyri hvørt megabýt. Prísirnir eru uttan MVG.*

Føroya Tele kann nú bjóða tær eina heilt nýggja tænastu, ið kallast sn@rNET. Hetta er eitt fast samband bygt á ADSL tøknina, ið gevur tær eina móttøkuferð upp til 1024 k/sek*), har tað vanliga uppringda sambandið, vit kenna í dag, bert kann móttaka og senda upplýsingar við eini ferð millum 28 og 56 k/sek. Umframt skjótu ferðina eru eisini hópin av fyrimunum og nýggjum møguleikum við tænastuni.

Vilt tú vita meira um sn@rNET, er tú vælkomin inn í eina av Telebúðunum eftir einum faldara ella vitja okkara heimasíða á www.tele.fo.

**) Galdandi fyri virki. Fyri privat kann hægsta móttøkuferðin vera 512 kb/sek.*
***Avmarkingar:** Av tí at ADSL-tøknin setur stór krøv til telefonlinjuna, eru avmarkingar fyri, hvar Føroya Tele kann veita sn@rNET.*

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*

petur & petur • 320870

Føroya Tele • Postboks 27 • 110 Tórshavn • Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • e-mail: ft@ft.fo • www.tele.fo